# Summarhitt á Summar Festival

**Fangandi summarpoppur verða at hoyra, tá ið týsku poppstjørnurnar í Banaroo fara at syngja á Summar Festivalinum í august. Sangurin Ba Yonga Wamba er seinasta hittið frá bólkinum**

TÍÐINDASKRIV

Lættur og glaður summarpoppur er av álvara komin á skránna hjá Summar Festivalinum, nú festivalurin boðar frá, at bólkurin Banaroo fer at spæla á Summar Festivalinum í ár.

Banaroo hevur seinastu tvey árini verið ein afturvendandi gestur á hitlistum í Týsklandi, Eysturríki og Sveis, har øll kenna bólkin við teimum fangandi poppsangunum.

Seinasta hittið hjá bólkinum, Ba Yonga Wamba, er eitt ordans summarhitt, sum eisini hevur verið nógv spælt í føroyskum útvarpi seinastu vikurnar.

## Ovast á hitlistum

Bólkurin Banaroo er mannaður við tveimum kvinnum og tveimum monnum, og Vito, Cat, Steffy og Bobby gjørdust landskend í Týsklandi, tá ið sjónvarpsrásin Super RTL fylgdi bólkinum í eini reality-sending í 2005.

Tá ið fyrstu sangirnir hjá bólkinum vórðu givnir út í fjør, stuku teir beinanvegin upp á hitlistarnar í Týsklandi og grannalondunum. Útgávan Banaroo's World kom beinleiðis inn á týska hitlistan sum nummar 1, og stakfløgurnar hava staðið seg heilt væl.

Nú er tíðin eisini komin til, at føroyingar taka Banaroo til sín, og fyrstu ábendingarnar um hetta eru longu komnar, tí Banaroo er í løtuni at finna á 15 teimum bestu við summarslagaranum Ba Yonga Wamba. Millum hinar kendu sangirnar hjá bólkinum eru Um Mamma, Dubi Dam Dam, og I'll Fly Away, sum er spildurnýggj stakfløga frá bólkinum.



*Summarfestivalurin verður ein summarveitsla, tá Banaroo spæla Ba Yonga Wamba á Vágsbøi*
*Mynd: Manfred Esser*

## FAKTA

Banaroo er poppbólkur úr Týsklandi
Tvær kvinnur og tveir menn syngja í bólkinum
Tey eita Vito, Cat, Steffy og Bobby
Fyrsta útgávan hjá bólkinum, Banaroo's World, varð nummar 1 í Týsklandi
Seinasta hittið hjá Banaroo er Ba Yonga Wamba


MARKNAÐARRÁK VIKA 26 2007

**KEYPSTILMÆLIÐ VAR RÆTT**

Hósdagin í farnu viku varð Føroya Banki skrásettur á VMF á OMX í Reykjavík og Keypmannahavn. Tey, ið teknaðu seg fyri partabrøvum áðrenn skrásetingina, fingu tey fyri kurs 189. Tá handilin við partabrævinum byrjaði, var kursurin 220. Síðan tá er hann hækkaður 15% til í løtuni 249. Tey, ið keyptu til kurs 189, hava sostatt vunnið 32% higartil upp á keypið.

Vit mæltu til at keypa partabrævið í nýtekningini fyri 189. Hetta var í høvuðsheitum grundað á, at vit væntaðu at keypsáhugin fór at vera stórur í byrjanini, umframt at útlitini fyri, at bankin fer at renta eginpeningin við meir enn 12% í 2007, eru hampulig. Nú kursurin er 249 kunnu vit staðfesta, at keypstilmælið var rætt. Nú fara íleggjararnir at hava eyguni eftir hálvársroknskapinum.

**YEN Á TÍ VEIKASTA Í 4 ÁR**

Yennurin, ið var uppá sítt lægsta mótvegis dollaranum í 4½ ár í farnu viku, styrknaði eitt sindur aftur mótvegis dollaranum og evruni. Hækkingin kom aftaná at japanski fíggjarmálaráðharrin ávaraði íleggjarar um at taka veiku støðuna fyri givnað og segði at órógvandi sveiggj í gjaldoyranum eru óynskt. Dollarin er seinastu 14 dagarnar lækkaður úr 5,60 í 5,53 orsakað av verri búskapartølum í seinastuni. Um støðugu prísvakstrartølini í Evropa halda fram hesa vikuna, fer evran sannlíkt at ligga í stað.

**LÁNSBRÆVARENTUR STØÐUGAR**

Lánsbrævarentur vóru støðugar í farnu viku. 10-ára rentan er í løtuni 4,66%. 10-ára rentan er hækkað 0,44% síðan mai. Lánsbrævamarknaðurin liggur nú støðugur eina tíð áðrenn næsta lopið.

**HESA VIKUNA**

Marknaðirnir verða væntandi friðarligir til hósdagin. Tá verður rentufundur í amerikanska tjóðbankanum, Fed. Tá koma eisini hagtøl fyri prísvøksturin, sum er sera avgerandi fyri framtíðar rentupolitikkin hjá Fed.

**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Donsk 10-ára renta**




| Marknaðir | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Norðurlond | 1441,76 | -0,97% |
| Alheims partabrøv | 8810,72 | -1,99% |
| Atlantic Petroleum | 1060,00 | -6,61% |
| Føroya Banki | 249,00 | + 31,75% |
| KB Trygg Eurostoxx | 111,20 | + 0,16% |
| USD | 552,67 | -0,39% |
| JPY | 4,47 | -0,40% |

Broytingarnar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðarnar.
Greiningin er grundað á keldur, sum Kaupthing metir vera álítandi, men Kaupthing hevur ikki ábyrgd av, at tilfarið altíð er neyvt og nágreiniligt. Kaupthing kann heldur ikki ábyrgdast tapi ella líknandi, sum stendst av gerðum, ið hava støði í greiningunum í hesum tilfari.

Postsmoga 3090, Bókbindaragøta 8, 110 Tórshavn, Tel 351500, Faks 351501, kf@kaupthing.fo, www.kaupthing.fo

KAUPTHING BANK